# Føroyskir ungdómar í Grønlandi

*Endamálið við ráðstevnuni er, at ung úr útnorði hittast og arbeiða saman um verkætlanir, sum tey hava fyrireikað frammanundan*

STEFAN Í SKORINI

Hósmorgunin leggja seks føroyskir ungdómar leiðina til Grønlands saman við einum leiðara. Tey fara at luttaka á eini ungdómsráðstevnu, sum verður í Ilulissat í Vesturgrønlandi. Økið er á støðd við Danmark, men har búgva bara 4.600 fólk.

Undan ferðini hava tey ungu gjørt nakrar fyrireikingar til verkætlanir, sum tey skulu brúka á ráðstevnuni. Føroysku ungdómarnir hava gjørt eina verkætlan, har tey seta upp eitt forum. Her verða ymisk viðkomandi evni hjá ungum í útnorði tikin upp til kjak. Tað kann verða dálking í útnorði ella eitt minni staðbundið evni sum samleiki. Hetta verður uppskotið til verkætlan, sum tann føroyski bólkurin fer at leggja fram.

Allir bólkarnir hava fyrireikað sína verkætlan, tá tey koma, og síðani skulu tey saman koma ásamt um, hvør verkætlan skal fullførast á ráðstevnuni.

Eisini hava teir seks føroysku ungdómarnir gjørt sína egnu persónligu dreymaverkætlan, sum tey kundu hugsa sær var sett í verk. Hesar verkætlanir eru sjálvandi tengdar at, hvørjum bólki tey koma frá. Ein, sum fæst við sjónleik, hevur gjørt eina verkætlan innan sjónleik o.s.fr.

**Fylgja við á internetinum**

Fyri at onnur enn bara tey 35, sum eru á ráðstevnuni kunnu fylgja við tí, sum fer fram, hava fyrireikararnir gjørt eina heimasíðu. Inni á www.ilulissat.gl/Nord-Seminar kunnu øll fylgja við, tí luttakararnir leggja frágreiðingar inn so hvørt.

Á heimasíðuni ber eisini til hjá øðrum ungum at seta spurningar, sum kunnu verða tiknir við í kjakið. Við at geva øðrum henda møguleikan ætla fyrireikararnir, at orðaskiftið verður breiðari enn undanfarin ár. Tað at taka internetið í brúk er ein nýggjur táttur á slíkum ráðstevnum.

Fyrsta ráðstevnan varð fyrstu ferð hildin á Álandi í 1996 . Í 1998 var hon her í Føroyum, og í fjør í Íslandi.

Tey, sum fara við til Grønlands, eru úr ymiskum bólkum og feløgum. Føroysku luttakararnir eru: Elin Mortensen úr Ung í Máf, Anita Ottosen úr Ungdómshúsinum Margarinfabrikkini. Fía Lindenskov úr Sosialistiskum Ungmannafelagi, Karstin Olgar Lamhauge úr Blá Kross Ungdómi, Rúni Thomsen úr KFUM skótunum og Niklas Winther úr Føroya Ungdómsráði.

Endamálið við ráðstevnuni er eisini, at ung, ið eru virkin innan mentan og frítíðarvirksemi, hittast at arbeiða sama um verkætlanir og læra um, hvørjir stuðulsmøguleikar eru til at fremja verkætlanirnar. Eisini verður arbeitt við, hvussu ein verkætlan fæst í lag.

Jákup av Skarði fer við sum leiðari, og hann hevur eisini verið við til at fyrireika ráðstevnuna. Tað er Føroya Ungdómsráð, sum stendur fyri føroysku umboðanini.



# Amerikanska Anadarko vil loysa basaltknútin



*Anadarko er eitt tað felagið, sum hevur lagt størstan dentin á at loysa gátuna við basaltinum, tvs. hvussu man kann síggja niður gjøgnum tjúkku basaltfláirnar og finna nýggj prospekt. Loyvini hjá Anadarko eru eisini tey, sum liggjast inni á basaltinum, næst Føroyum niðri í vinstra horni og ovari. Sí kortið.*

JAN MÜLLER

-Vit eru fegnir um tiltakið, og vit eru sinnaðir til at arbeiða víðari við hesum saman við myndugleikunum og ídnaðinum sigur umboðsmaðurin fyri oljufelagið Anadarko, sum fekk tvey 9-ára loyvi, annað einsamalt og hitt saman við Statoilbólkinum, bæði tvey inni á tí tjúkka basaltinum. Scott Albertson, sum tók ímóti loyvunum, sigur, at basaltið er ein spennandi avbjóðing, sum teir vilja arbeiða við. Hetta er eisini nakað teir eru vanir við at arbeiða við aðrastaðni.

-Nú vit ikki fingu nakað loyvi í lovaðu økjunum saman við Norsk Hydro og Agip vilja vit so brúka okkara royndir og vitan til at loysa gáturnar kring basaltið. Scott Albertson sigur, at teir tey komandi trý árini fara at brúka ta nútímans tøknifrøði, sum er og verður tøk til hetta endamálið. - Vónandi kunnu vit koma fram við nýggjum hugskotum og loksins enda við at seta upp nøkur prospekt.

Um lisensin teir hava saman við Statoil sigur hann, at teir hava havt góðar samrøður saman og er hann fegin um, at Statoilbólkurin eisini hevur somu hugskot og tankar sum teir um hetta stóra økið, ið liggur næst Føroyum av loyvunum. Hann gleðir seg til at arbeiða saman við Statoil.




*Á kortinum síggja vit hvar loyvini hjá Anadarko eru - heilt inni á basaltinum. Hetta eru 9 ára loyvi og tað merkir, at felagið skal ikki gera nakra boring komandi 3 árini, men eftir tað skal tað gera av, um tað ynskir at fara undir boring á ávísum øki komandi árini.*

# Sigldu á aliring

*Hol kom á eina nót hjá Dalásmolt, tá ið ein bátur hjá J & K Petersen kom ov nær einum av ringunum beint sunnanfyri Gomlu Rætt*

STEFAN Í SKORINI

Tá menn frá J & K Petersen fríggjadagin vóru í ferð við at flyta ein flaka, sum verður nýttur í sambandi við vegagerðina til undirsjóvartunnilin undir Vestmannasund, vóru teir so óhepnir at koma ov nær einum av aliringunum, og hol kom á nótina.

Dalásmolt hevur sjey aliringar liggjandi beint sunnanfyri ferjuleguna á Gomlu Rætt, og tað var ein av hesum ringunum, sum varð raktur.

Flakin skuldi flytast til Vestmanna, men ov illsligt var í veðrinum til at flyta flakan, og tí varð avgerð tikin um at fara aftur á Gomlu Rætt.

Tá teir koma á Gomlu Rætt, ber skrúvan á bátinum við nótina í einum aliringi, og hol kom á. Ein froskmaður var beinanvegin sendur niður at bøta nótina, so ikki allur alilaksurin slapp.

Jens Reinert, stjóri á Dalásmolt, vil ikki gera nakra meting um, hvussu nógv er sloppið, men tað er minni enn av fyrstan tíð mett. Tó verður hildið, at væl minni enn helmingurin er sloppin av teimum 40 tonsunum, sum eru í ringinum. Alt er tó tryggjað, so Dalásmolt hevur ikki nakran peningaligan miss av óhappinum.

Mánadagin verður ringurin taldur, og tá fæst greiði á, hvussu nógv er sloppið, og hvussu nógv skaðin kostar.

# Kvinnan fekk 5 mánaðar

*33 ára gamla kvinnan varð í rættinum týsdagin dømd fimm mánaðar fongsulsrevsing fyri at hava verið við í hassjsmugling, men hon verður longu leyslatin um eina góða viku*

STEFAN Í SKORINI

Ákærin vildi hava 8-10 mánaðar fongsul, tí hann helt tað verða so mikið álvarsom lógarbrot, sum kvinnan hevði framt. Verjin mældi hinvegin til tríggjar mánaðar.

Kvinnan varð funnin sek í at hava smuglað gott eitt kilo av hassji til landið á páskum í ár, sum hon eisini greiddi frá í rættinum. Hetta var tann fyrsta av fýra ákærum.

Dómarin segði í úrskurðinum, at tað ongantíð varð prógvað, at tað vóru trý kilo av hassji, sum hon hevði tikið ímóti í Vestmanna á sumri í fjør, sum ákærin vildi verða við í tí næstu ákæruni.

Kvinnan varð eisini ákærd fyri at hava hótt persónar í málinum, men fyri hesar ákærur varð hon fríkend.

Kvinnan viðgekk í rættinum hava koyrt bil ávirkað, og hon missir tí koyrikortið í tvey ár fyri rúsdrekkakoyring.

Kvinnan hevur longu verið varðhaldsfongslað í tríggjar mánaðir, og hesir verða drignir frá dóminum á fimm mánaðir. Tá tað er vanligt, at fangar verða leyslatnir, tá teir hava sitið tveir triðingar av dóminum, so verður kvinnan leyslatin aftur um eini tíggju dagar.



# Fríhandilsavtalan kann lækka húsaprísirnar

*Avltalan um fullkomnan fríhandil millum Rusland og Føroyar skapar fortreytir fyri býtishandli. Tískil kunnu vit til dømis fáa fatur á ógvuliga bíligum timburi frá russum aftur fyri fisk*

JOHN JOHANNESSEN

Timburið, sum føroyingar í dag flyta inn, kemur í stóran mun úr Russlandi. Men kortini keypa vit tað umvegis Ísland.

Hetta heldur Árni Dam á Skipafelagnum, sum í mong ár hevur handlað nógv við russar, vera púra burturvið.

Árni Dam vísir á, at føroyingar, nú fríhandilsavtalan verður undirskrivað, fáa møguleikan at handla beinleiðis við russisku útflytararnar. Vit sleppa undan stórum pappírsveldi og umvegis handlum. Og tískil kunnu vit fáa fatur á til dømis byggitilfari fyri lítið og lætt, uttan at gjalda annað enn fisk afturfyri.

**Roynt tað áður**

– Í fimtiárunum gjørdu føroyingar fyrstu handilsavtaluna við Rusland. Hetta var ein sáttmáli um býtishandil, og kom hann væl við hjá okkum, sigur Árni Dam.

Hendan handilsavtalan innibar, at føroyingar útfluttu hópin av sild til Russlands og fingu tóvverk afturfyri.

Somuleiðis heldur Árni Dam, at vit í dag kunnu samstarva við býtishandli, soleiðis at vit aftur fyri svartkjaftin og annan fisk, vit selja russum, kunnu fáa timbur, takplátur og annað byggitilfar.

Hetta byggitilfar er ógvuliga bíligt orsakað av lágu lønunum í Russlandi. Tí kunnu vit fáa stórar nøgdir av slíkum tilfari til Føroya fyri lítið og lætt.

Tískil eru bæði Árni Dam og búskaparfrøðingurin, Jonhard Eliasen, samdir um, at fríhaldilsavtalan kann gera tað munandi bíligari fyri Føroyingar at byggja hús, treytað av, at timburhandlarnir fara at lækka prísirnar samsvarandi innkeypsprísunum.

**Lættir munandi um**

Árni Dam handlar dagliga við russar fyri Skipafelagið Føroyar, men hann vísir á, at tað í løtuni er ógvuliga tungt at handla við Russland, tí hesin handil krevur so nógv pappírsveldi og umsiting.

Hesum roknar Árni Dam kortini at sleppa undan, nú vit fáa fríhandilsavtalu.

– Fríhandilsavtalan fer at gera, at vit sleppa undan at søkja konsulát og onnur um loyvi, hvørja ferð vit skulu gera ein handil við russar. Nú fer tað at verða skótt at avgreiða ein handil, og hetta fer eisini at merkja størri vinning, sigur Árni Dam.

Árni Dam vísir á, at hetta fer at verða galdandi fyri allar fyritøkur, ið handla við russar. Tískil roknar hann við, at fríhandilsavtalan kemur at hava stóran týdning fyri føroyska búskapin.

# Avtalan við russar komin undir land

*Gjáramorgunun sessaðust russiska og føroyska samráðingarnevndin við samráðingarborðið í Tinganesi at gera endaliga avtalu um fríhandil*

JOHN JOHANNESSEN

Tá Alexandre I. Borissov frá russisku myndugleikunum og Herluf Sigvaldsson frá føroysku myndug-leikunum gjáramorgunin settust hvør sínu megin samráðingarborðið í Sjó- og Vektarbúðini í Tinganesi høvdu teirr sett sær fyri at vera lidnir við eina fríhandilsavtalu áðrenn dagurin var liðin.

Tá Sosialurin fór til prentingar beint eftir middag, var tó enn ikki greitt, um avtalan var komin undir land. Tað bar ikki til at fáa fatur á føroyska samráðingarleiðaranum.

Sosialurin skilir tó, at sáttmálin verður undirskrivaður, tí talan er bert um nakrar tekniskar orðingar, sum skulu fáast frá hondini.

Tað hevur gingið strilti at fáa endaliga samráðingarfundin í lag. Seinast russiki samráðingarleiðarin, sum er stjóri fyri fíggjar og handilsdeildini hjá russisku stjórnini, skuldi koma til Føroya, kom annað í vegin.

Fríhandilsavtalan við Føroyar er fyrsta fríhandilsavtalan, Russland ger nakað evropeiskt land.



*Alexandre I. Borissov, stjóri fyri handils- og fíggjardeildina hjá russisku stjórnini, og Herluf Sigvaldsson, stjóri á uttanlandsdeildini hjá landsstýrinum sessaðust gjáramorgunin at gera endaliga avtalu um fríhandil landanna millum* Mynd: Álvur Haraldsen

# Helst noyddir til Danmarkar at samráðast

**Komandi samráðingarfundurin um ríkisrættarligu støðuna verður helst ikki eins og ætlað í Føroyum**

JOHN JOHANNESSEN

Útvarp Føroya visti fyrrakvøldi at siga, at greiðar ábendingar eru um, at komandi fundurin millum landsstýrið og donsku stjórnina um ríkisrættarligu støðu Føroya helst verður í Danmark í oktober.

Landsstýrið hevði annars ætlað, at hesin fjóðri fundurin skuldi haldast í Føroyum, men nú letur til, at tað ikki fer at bera til hjá øllum donsku lyklaráðharrunum at koma til Føroya at samráðast í oktober.

Fundurin varð annars útsettur til oktober, fyri at tað skuldi bera til hjá donsku ráðharrunum at koma til fundin.

Løgmaður og varaløgmaður siga báðir, at tað enn ikki endaliga er avgreitt, hvar og nær næsti samráðingarfundurin verður, og at tíðindini um, at hann verður í Danmark tískil mugu standa fyri Útvarpsins rokning.

**Lesið eisini Sosialin á Internetinum**
www.sosialurin.fo

HYGG HER

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Brúktir bilar til sølu

| Verksmiðjumerki | km. | mán. | árg. | søluprísur |
|---|---|---|---|---|
| Toyota Camry STC 2.0 (AVHEINTINGAR-TILBOÐ) | 160.000 | Aug. | 1987 | 9.000,- |
| BMW 316 (1.6) EILER | 30.000 | Juli | 1997 | 129.000,- |
| Suzuki Baleno Van | 35.000 | Aug. | 1997 | 75.000,- (Við MVG) |
| Ford Escort Diesel | 86.000 | Aug. | 1996 | 103.500,- |
| Citroën BX 1.9 Diesel | 185.000 | Aug. | 1991 | 65.000,- |
| Opel Astra 1.6 GLS | 66.000 | Sept. | 1995 | 99.900,- |
| Citroën Xantia 3.0 V6 | 34.500 | Juni | 1998 | 180.000,- |
| MAZDA 323 1.5 SEDAN | 2.500 | Mars | 2000 | 145.000,- |
| Mitsubishi Lancer Diesel | 189.500 | Juli | 1990 | 23.000,- |
| BMW 320i (AVHEINTINGAR-TILBOÐ) | 216.300 | Mai | 1987 | 19.000,- |
| GALLOPER 2.5 Tdi - 7 pers. | 37.400 | Apríl | 1999 | 215.000,- |
| GALLOPER 2.5 Tdi 3H VAN | 38.700 | Feb. | 1999 | 165.000,- (Við MVG) |
| Fiat Scudo 1,9 TD | 130.000 | Mars | 1997 | 130.000,- (Við MVG) |
| Citroën ZX 1.9 D Stw. | | Feb. | 1995 | 89.000,- |
| FORD FIESTA | 114.000 | Mai | 1989 | 23.000,- |
| Citroën ZX 1.4i IMAGE | | Jan. | 1996 | 60.000,- |
| OPEL ASTRA 1.7 TURBO DIESEL | 81.000 | Des. | 1996 | 115.000,- |

OG FLEIRI AÐRAR BRÚKTAR BILAR SO HYGG INN Á GÓLVIÐ
OG FÁ EITT GOTT TILBOÐ!

AVHEINTINGAR-TILBOÐ
ISUZU PICK UP 4X4 • 226.500 km.
Árg. Okt. 1989 • Einans kr. 15.000,-

Vælkomin til

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI MOTORS
Ivan Johansen Bilar
www.ivan.fo

Hoyvíksvegur 63 - FO-100 Tórshavn - Tel. 313666 - Fax 310866